# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*– Eg tími ikki at ganga og mala onkrastaðni í Europa, um eg ikki er glaður fyri at vera har.*

*Jesper Grønkjær, sum er komin heim til Danmarkar at spæla við FCK.*

# Stórur spenningur er um tvey FM heiti

**Felags fyri teir tríggjar bátarnar, sum tryggjaðu sær FM heitið í Sandavági, var, at teir gjørdu tað við sigrum á Vestanstevnu**

FM KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*

Í trimum av sjey FM kappróðrum er tað eftir róðurin á Vestanstevnu, sum leygardagin og í góðum líkindum var í Sandavági, avgjørt, hvør er føroyameistari í 2006.

Felags fyri teir tríggjar bátarnar, sum vunnu FM, varr, at teir vunnu sínar róðrar á Vestanstevnu.

Ørnin við kvinnum var fyrsti meistari. Ørnin vann ógvuliga sannførandi í heimasjógvi kappingina millum 5-mannaførini við kvinnum. Hetta var fyrsta ferðin síðani 1998, at Ørnin hevur vunnið FM.

Sigurin hjá monnunum umborð á 6-mannafarinum Sølmundi var tepur, men tað var ikki fyrrenn í endaspurtinum, at Sølmundur var hóttur. Sølmundur hevði leingi verið eina hálva og onkra løtuna eina heila bátslongd frammanfyri hinar bátarnar. Sølmundur hevur tvær ferðir áður vunnið FM. 6-mannafarið hjá Kappróðrarfelagnum NSÍ við monnum var eisini meistari í 1989 og í 1990.

Triði meistarin var dreingirnir umborð á Rituni, sum vunnu kappingina millum 5-mannaførinum. Hetta meistaraheitið var søguligt, tí hetta var fyrstu ferð nakrantíð, at 5-mannafarið hjá teimum í Norðdepli og Hvannasundi vann FM.

Sosialurin ynskir øllum meistarunum hjartaliga tillukku.

## Nógv feløg

Eyðkennið fyri kappróðrarnar í summar hevur verið, at tað á øllum stevnunum hevur verið onkur vinnari, sum ikki hevur vunnið í undanfarnu róðrunum. Hesa ferð vóru tað genturnar á 5-mannafarinum Hvassa av Oyri, sum vóru nýggjur vinnari.

Í FM kappingini eru tað Blikur av Argjum og Frúgvin úr Miðvági, sum kappast um FM. Tann av teimum, sum fer at koma fyrri á mál á Ólavsøku, verður meistari. Tað er serliga í kappingini millum 5-mannafør við gentum og millum 6-mannafør við kvinnum, at tað undan Ólavsøkuni er stórur spenningur um, hvør fer at verða meistari.

Róðrarfelagið í Miðvági hevur bæði í kappingini millum 5-mannafør við gentum og í kappingini millum 6-mannafør við kvinnum meistaraheitið undir borðinum. Riddarin noyddist aftur í Sandavági at víkja fyri óføru kvinnunum umborð á Jarnbardi. Men Riddarin er framvegis favorittur at vinna FM. Tað ger hann, um Jarnbardur ikki verður meiri enn eitt pláss frammanfyri Riddaran.

Knørrafelagið hevur møguleika at vinna tvey FM heiti. Umframt kvinnurnar umborð á Jarnbardi so er talan um 8-mannafarið Knørr. Eftir sigurin á Vestanstevnu ber tað ikki til hjá Knørri at sleppa undan at vinna FM. Luttøkan í hesi kappingini er lítil. Tað ber við sær, at um Knørrur megnar at koma á mál ólavsøkuaftan, so verður hann meistari.

Og so er tað meistaraheitið í kappingini millum 10-mannaførini. Tað skal vilja illa til hjá Klaksvíkingi, um hann ikki skal vinna FM. Men í tí kappingini er tað so nógv annað, sum eisini stendur upp á spæl.

Trý feløg hava longu vunnið hvør sítt FM heiti. Tvey feløg hava so at siga tryggjað sær hvør sítt FM heiti. Tað er møguleiki fyri, at uppaftur tvey feløg afturat fara at vinna hvør sítt FM heiti, men tað kann eisini laga seg soleiðis, at tvey feløg fara at vinna tvey FM heiti í part, og at trý feløg fara at vinna hvør sítt FM.



*Tríggjar kappingar eru avgjørdar undan seinasta róðrinum, aðrir eru mest sum avgjørdar, men stórur spenningur er eisini í tveimum kapping*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Støðan í FM

**5-mannafør dreingir**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Ritan | 39 | |
| 2. | Jallurin | 30 | |
| 3. | Kollur | 24 | |
| 4. | Havfrúgvin | ½5 | |
| 5. | Sílið | 12 | 1GK |
| 6. | Strípan | 10 | |
| 7. | Blikur | 2 | |
| 8. | Drekin | 0 | |

**6-mannafør kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Riddarin | 34 | 1GK |
| 2. | Jarnbardur | 31 | |
| 3. | Lómur | 29 | |
| 4. | Smyril | 17 | |
| 5. | Hvessinugr | 14 | |

**5-mannafør gentur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Blikur | 31 | 1GK |
| 2. | Frúgvin | 31 | |
| 3. | Hvassi | 21 | 2GK |
| 4. | Havfrúgvin | 20 | |
| 5. | Drekin | 19 | |
| 6. | Firvaldur | 5 | |
| 7. | Ørnin | 3 | |
| 8. | Dúgvan | 3 | |
| 9. | Firildur | 0 | |
| 10. | Sílið | 0 | |

**5-mannafør kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Ørnin | 40 | |
| 2. | Sílið | 30 | |
| 3. | Ritan | 21 | |
| 4. | Jallurin | 21 | 1GK |
| 5. | Junkarin | 12 | |
| 6. | Drekin | 8 | 1GK |
| 7. | Tekla | 0 | 1GK |
| 8. | Tjaldrið | 0 | 1GK |
| 9. | Báran | 0 | 1GK |
| 10. | Blikur | 0 | |

**6-mannafør menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Sølmundur | 40 | |
| 2. | Sundabáturin | 32 | |
| 3. | Jarnbardur | 24 | |
| 4. | Smyril | 12 | |
| 5. | Hósvíkingur | 11 | |
| 6. | Gongurólvur | 10 | |
| 7. | Páll Fangi | 3 | |

**8-mannafør**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Knørrur | 38 | 1GK |
| 2. | Ørvur | 33 | 1GK |
| 3. | Argjabáturin | 24 | |
| 4. | Nevið Reyða | 19 | |
| 5. | Kvívíkingur | 2 | 1GK |

**10. mannafør**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Klaksvíkingur | 36 | |
| 2. | Eysturoyingur | 32 | |
| 3. | Havnarbáturin | 21 | |
| 4. | Vestmenningur | 18 | 1GK |
| 5. | Skálabáturin | 17 | 1GK |
| 6. | Nólsoyingur | 8 | |
| 7. | Vágbingur | 0 | |

# Ørnin syrgdi fyri góðum stevnuhýri

**Hóast sigurin var dyggur í Sandavági, so ætla tær á Ørnini sær ikki at hvíla á Ólavsøku, tá ið tær hava sum mál at vinna uppaftur trivaligari sigur, enn tær gjørdu í heimasjógvi**

5-MANNAFØR KVINNUR
*Jóannes Hansen*

Tað passaði sum fótur í hosu hjá teimum í Sandavági. Dreymurin var, at tað skuldi eydnast kvinnunum á Ørnini at tryggja sær FM heitið á Vestanstevnu í Sandavági, og tað eydnaðist og tað við lít!

Ørnin legði bragdliga fyri, og eftir fyrstu tíggju tøkini var tað eingin ivi um, at tað var hvíti báturin við reyða stokkinum og bláu rimini, sum var fremstur, og sum harvið hevði beina kós móti at tryggja sær FM heitið.

Skuturin gjørdist til hálva bátslongd og síðani til eina bátslongd og til tvær ferðir tað og kanska meiri afturat. Fagnaðurin var stórur, tá ið Ørnin fór um málstrikuna og tryggjaði sær FM heitið. Tær í Sandavági eru nøgdar, men tær hava sett sær nýtt mál.

– Vit hava vant nógv og dygt alt árið. Vit fegnast um sigurin í dag og um meistaraheitið, men vit ætla okkum eisini at vinna á Ólavsøku. Málið er, at sigurin skal gerast uppaftur meiri sannførandi, enn hann var tað hesa ferð, var viðmerkingin hjá manningini á Ørnini, tá ið tær vóru komnar aftur á dráttin, og báturin mest sum í einum var syftur á land av mongu og fegnu viðhaldsfólkunum.

Hetta var sætta ferðin, at Ørnin við kvinnum vann FM. Hinar ferðirnar hava verið í 1988, 1990, 1991, 1997 og í 1998.

Kappingin um næstfremsta plássið var long og ógvuliga tøtt. Ritan var leingi næstfremst, men í síðstu tøkunum megnaði Sílið at taka Rituna. Sílið hevur verið næstfremst í øllum róðrunum í summar uttan á Jóansøku, tá ið Sílið vann.

Ta ferðina søgdu tær á Ørnini, at tær høvdu ikki hildið innanhýsis avtalurnar, sum tær høvdu undan róðrinum. Tá góvu tær lyfti um, at eingin slingur skuldi vera í valsinum í næstu róðrunum. Lyftið hava tær hildið yvir fyri sær sjálvum bæði í Vestmanna og Sandavági.

Undan Ólavsøkuni er ilt at ímynda sær, at nakar skal megna at taka Ørnina. Um tað ikki fer at eydnast at vinna á Havnarvág, so ber illa til at ímynda sær aðra orsøk, enn at tær aftur fara at gloyma avtalurnar og harvið at fella seg sjálvar, og tað fara tær neyvan.

Næstfremsta plássið ber við sær, at Sílið hevur tryggjað sær silvurplássið í FM kappingini. At Ritan endaði á triðja plássi á Vestanstevnu ber við sær, at Ritan nú hevur lagt seg upp á síðuna av Jallinum í kappingini um bronsumerkini. Hesa ferð eydnaðist tað ikki so væl hjá Jallinum, sum endaði á fimta plássi. Junkarin megnaði at vinna fjórða plássið.

**Úrslit - 5 mannafør kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Ørnin | 05:06.08 |
| 2 | Sílið | 05:12.02 |
| 3 | Ritan | 05:12.06 |
| 4 | Junkarin | 05:17.06 |
| 5 | Jallurin | 05:17.08 |
| 6 | Drekin | 05:19.08 |
| 7 | Tjaldrið | 05:25.20 |
| 8 | Báran | 05:27.13 |
| 9 | Blikur | 05:45.19 |